


## BESTI NÝGGI BÓLKUR:

# ONIONTREE

### SPILDURNÝGGI ROKK- PUNK BÓLKURIN ONIONTREE VANN Í ÁR VIRÐISLØN FYRI ÁRSINS NÝGGJA BÓLK. TEIR ERU FÝRA Í BÓLKINUM, OG HAVA FYRI STUTTUM ÚTGIVIÐ EINA FLØGU. TAÐ ER EIN SOKALLAÐ EP, SUM INNIHELDUR 4 LØG

**Barbara Holm**
**barbara@sosialurin.fo**

Hóast bert eitt ár baki, so hevur Oniontree spælt til nógv tiltøk, eitt nú í Vega við The Dreams, og Náttin er ung í Høllini á Hálsi.

Bólkurin hevur leingi arbeitt við EP'ini, og sjálvt um tað hevur verið strævið við tí fíggjarliga partinum, so hevur bólkurin kortini megnað, at fingið EP'ina útgivna. EP'in berir heitið, "Solitude", sum eisini er eitt av løgunum á fløguni. Lagið "The Machine" hevur seinastu vikurnar ligið nummar eitt á 15 teimum bestu hjá Kringvarpinum.

Fløgan er upptikin í Kris-stuff studio hjá Kristoffer Mørkøre, og ljóðblandað av kenda danska metal-miksaranum, Jacob Hansen, og hann segði soleiðis um Oniontree á heimasíðuna hjá sær, www.jacobhansen.com: "Oniontree – Føroyingar megna altíð at taka meg av bóli. Hesin bólkurin er púra ókendur, men megnaði kortini at bergtaka meg. Tónleikurin er ikki heavy metal, men meira rokk/popp kendur. Eg havi ljóðblandað fýra løg, sum eg vil viðmæla øllum at lurta eftir."

> - TAÐ HEVUR GINGIÐ ÓTRÚLIGA SKJÓTT FYRI SEG HJÁ OKKUM. VIT HAVA LIGIÐ NUMMAR EITT Á 15 TEIMUM BESTU, OG NÚ HAVA VIT VUNNIÐ HEIÐURSLØN SUM BESTA NÝGGJA BÓLK. TAÐ ER FANTASTISKT, OG MÁ MERKJA, AT VIT HAVA FATUR Á TÍ RÆTTA, SIGUR FRÍÐI TANGGARD BJØRGVIN, EIN AV ODDAMONNUNUM Í ONIONTREE

Oniontree finnur í stóran mun íblástur úr punk og alternativum tónleiki. Harafturat úr øðrum hørðum og bleytum tónleiki. Bólkar, ið teir hava fingið íblástur frá eru til dømis Rise Against, Angels & Airwaves og heimskenda og vælumtókta Linkin Park.

Bólkurin eisini í fer við at tilrættisleggja ein 'Føroyar Release Tour'.

Sangurin "Solitude" er við í einari kapping, sum eitur, "The best new song in the world", og liggur til at koma víðari í kappingini. Til ber at atkvøða fyri sanginum á www.thebestnewsong.com.

Manningin í Oniontree er Sigmund Jørgensen, gittar og sang. Fríði Tanggaard Bjørgvin, gittar og kór. Jan Mýrá, bass. Magnus Ovason, trummir.